Viðmerking:

# Smádreingir í Tinganesi, ella hvat?



Nú eru fjølmiðlar í Føroyum allir á tremur við tíðindum um samráðingarnar við danir um sjálvstýris og loysingarmál føroyinga, og tað við góðari grund.

Loysingarflokkarnir tykjast tó verða samdir um, at ikki ber til at kappa á stokkinum, her og nú, ætla at hava eina skiftistíð uppá eini 10-15 ár. Her verður spurt, hvat er til hindurs fyri, at miðvíst verður hildið fram móti størri sjálvbjargni undir núverandi skipan?

Danska veitingin til Føroyar við blokkinum er uml. 1 milliard krónur árliga, sum landsstýrið sjálvt fær at ráða yvir. Herumframt eru einar 400 milliónir ið ikki eru innroknaðar í blokkin sum danir gjalda beinleiðis til lønir, t.d. løgregla, dómsvaldið, bispar, prestar o.a.

At hugsa sær, um henda upphædd varð umsett í t. d. undirsjóvartunlar. Bjartskygna kostnaðarmeting landsstýrisins av tunlinum um Vestmannasund er kr. 240 milliónir. Tað vil siga, at fyri árligu donsku veitingarnar kunnu byggjast 6 tunlar sum hesin, hvørt árið í Føroyum.

Nú er rímiligt, sum vanligur borgari í Føroyum, at spyrja, hvat landsstýrið hugsar fyri sær. Sum er, klára teir ikki at geva borgarum sínum tær sømdir teir eiga at fáa. - Skúlaverkið liggur á láni og lamið, gullnám tjóðveldissins, postverkið liggur í fíggjarligum andaleypi. Avlamin og pensionistar fáa iki tær samsýningar tey eiga, smb. avtalu við donsku stjórnina o.s.fr.

Sjálvir hava politikarar givið sær eina lønarviðbót uppá 80%. Seinasti trumfurin varð eina pensiónsskipan til sín sjálvs uppá 26.000 kr. um mánaðin. Tað er 6 1/2 ferð meira enn ein vanl. pensionistur fær. Slíkt eru menn. Hvat er í vegin fyri at teir ikki hava somu skipan sum øll onnur fólk?

Dreymur Høgna Hoydals, um at fáa merkið at veitra á FN bygninginum, kann neyvan brúkast til annað, enn at flagga á hálvari stong við, fyri tí sindri av vælferð sum enn, hóast alt finst í Føroyum.

Mær tykir at landsstýrið hevur sama hugburð sum smádreingir ið eru so altráir eftir at sleppa at flota sjálvgjørda bátin, langt áðrenn hann er sigliklárur. Tit hava ikki gjørt heimaarbeiði tykkara nóg gott og eru lopnir framav. – Føroya fólk hevur ikki gloymt 80 og 90 árini, tá føroysku vóru orsøk til størsta fíggjarskrall í landsins søgu, uttan tað fekk alraminstu avleiðing fyri teir seku – neyvan nakar flokkur undantikin. – Gerið ikki sama mistak aftur nú, bert 10 ár seinni. Gerið heimaarbeiðið tykkara til lítar fyrst.

Lesið eisini Sosialin á Internetinum

www.sosialurin.fo

## Smádreingir í Tinganesi, ella hvat?

Nú eru fjølmiðlar í Føroyum allir á tremur við tíðindum um samráðingarnar við danir um sjálvstýris og loysingarmál føroyinga, og tað við góðari grund.

Loysingarflokkarnir tykjast tó verða samdir um, at ikki ber til at kappa á stokkinum, her og nú, ætla at hava eina skiftistíð uppá eini 10-15 ár. Her verður spurt, hvat er til hindurs fyri, at miðvíst verður hildið fram móti størri sjálvbjargni undir núverandi skipan?

Danska veitingin til Føroyar við blokkinum er uml. 1 milliard krónur árliga, sum landsstýrið sjálvt fær at ráða yvir. Herumframt eru einar 400 milliónir ið ikki eru innroknaðar í blokkin sum danir gjalda beinleiðis til lønir, t.d. løgregla, dómsvaldið, bispar, prestar o.a.

At hugsa sær, um henda upphædd varð umsett í t.d. undirsjóvartunlar. Bjartskygna kostnaðarmeting landsstýrisins av tunlinum um Vestmannasund er kr. 240 milliónir. Tað vil siga, at fyri árligu donsku veitingarnar kunnu byggjast 6 tunlar sum hesin, hvørt árið í Føroyum.

Nú er rímiligt, sum vanligur borgari í Føroyum, at spyrja, hvat landsstýrið hugsar fyri sær. Sum er, klára teir ikki at geva borgarum sínum tær sømdir teir eiga at fáa. - Skúlaverkið liggur á láni og lamið, gullnám tjóðveldissins, postverkið liggur í fíggjarligum andaleypi. Avlamin og pensionistar fáa iki tær samsýningar tey eiga, smb. avtalu við donsku stjórnina o.s.fr.

Sjálvir hava politikarar givið sær eina lønarviðbót uppá 80%. Seinasti trumfurin varð eina pensiónsskipan til sín sjálvs uppá 26.000 kr. um mánaðin. Tað er 6 1/2 ferð meira enn ein vanl. pensionistur fær. Slíkt eru menn. Hvat er í vegin fyri at teir ikki hava somu skipan sum øll onnur fólk?

Dreymur Høgna Hoydals, um at fáa merkið at veitra á FN bygninginum, kann neyvan brúkast til annað, enn at flagga á hálvari stong við, fyri tí sindri av vælferð sum enn, hóast alt finst í Føroyum.

Mær tykir at landsstýrið hevur sama hugburð sum smádreingir ið eru so altráir eftir at sleppa at flota sjálvgjørda bátin, langt áðrenn hann er sigliklárur. Tit hava ikki gjørt heimaarbeiði tykkara nóg gott og eru lopnir framav. – Føroya fólk hevur ikki gloymt 80 og 90 árini, tá føroysku vóru orsøk til størsta fíggjarskrall í landsins søgu, uttan tað fekk alraminstu avleiðing fyri teir seku – neyvan nakar flokkur undantikin. – Gerið ikki sama mistak aftur nú, bert 10 ár seinni. Gerið heimaarbeiðið tykkara til lítar fyrst.

**Eiko Apol**

## Søgdu løgmaður og varaløgmaður ósatt?



Í krosskasti segði løgmaður fyri opnum skermi: Vit fara ikki at loysa. 2 dagar seinni møtir hann donsku stjórnini við einum uppkasti har stendur: Denne traktat om associeret statsforbindelse_ OPRETTER FÆRØERNE SOM EN FRI OG SUVERÆN STAT (afsnit 1,artikel 1, stk 2).

Nevnda orðing er loysing - tað kann ikki sigast greiðari!

Er Afsnit 1, artikel 1 stk 2 gjørt eftir krosskast sendingina? Tað eru vit mong, ið ivast í. Um ikki, var farið lætt um sannleikan av løgmanni í krosskasti, frammanfyri øllum føroya fólki.

Tað sæst svart uppá hvítt, nú samráðingarnar tíbetur ikki eru duldar meira.

**Nyrup framdi neyðugan opinleika í samráðingunum**

Boðskapurin hjá Nyrup er krystalklárur- 3-4 ár um loysing verður vald. Tað kunnu føroyingar fyrihalda seg til.

Mátin boðskapurin var framborin av Nyrup, kundi verið meira heppin. Nú roynir samgongan at fara eftir Nyrup, heldur enn fyrihalda seg til boðskapin hann kom við. Somuleiðis royna teir at skapa eina nationalromantiska øsing ímillum føroyingar. Tað er tað vit hava minst tørv á nú.

Føroyingar hava tørv á at vita konsekvensin av tí samgongan hevur runnið undan alla tíðina: Hvørjir vansarnir eru av at loysa.

Gleðiligt er, at almenningurin í Føroyum nú kann fylgja við í samráðingunum.

Vónandi fara okkara menn at halda seg til sannleikan. Og kalla ein spaka fyri ein spaka. Tí tað er fyritreytin fyri øllum konstruktivum arbeiði.

**Marjus Dam,**
**løgtingsmaður**

## Fullveldi grundað á hálvar sannleikar?

Komandi vikuskifti heldur Sambandsflokkurin landsfund í Øravík. Eitt av málunum, sum uttan iva fer at fáa drúgva umrøðu, verður ríkisrættarligu viðurskiftini eftir at landsstýrissamgongan er farin undir tingingar við donsku stjórnina.

Seinasta hálva árið hava fjølmiðlarnir gjørt nógv burturúr Hvítubók, sum landsstýrissamgongan lat evna til við tí fyri eyga at lýsa viðurskiftini í samband við eitt møguligt fullveldi. Nógv embætisfólk vóru sett á hesa uppgávu og nógvur peningur brúktur. Tað hevur ljóðað, at nýttar eru uml. 12 mió. kr. til hesa verkætlan.

**Verri at vera føroyingur**

Men arbeiðssetningurin var einsporaður: fullveldi! Ríkisrættarligu viðurskiftini sum heild og aðrir møguleikar enn fullveldi vóru ikki tiknir við. Í stuttum kann sigast, at úrslitið av verkætlanini greitt sigur, at tað verður verri at vera føroyingur, um vit fáa fullveldi ella loysing, sum fullveldi í veruleikanum er.

**Fullveldi setir okkum langt aftanfyri grannalond okkara**

Gaman í siga loysingar-



menninir, at tað bert er í eini skiftistíð, at búskaparliga niðurgongdin fer at gera seg galdandi, men so fer aftur at ganga framá. Men at vit sjálvt eftir at tað møguliga fer at ganga framá aftur vera nógv afturúrsigldir í mun til grannalond okkara og um vit høvdu varðveitt ríkisfelagsskapin, verður burturtagt.

**Týðandi samfelagstænastur í andaleypi**

Vit tevja longu nú dagliga vansarnar, sum eitt møguligt fullveldi fer at geva okkum. Í einum búskaparligum hákonjunkturi roynir samgongan at hava eitt stórt yvirskot á fíggjarlógini. Men hetta yvirskot er ikki til helvtar tað, ríkisveitingin gevur okkum. Og prísurin? Týðandi samfelagstænastur liggja á andaleypi: heilsuverkið, samferðslan, postverkið bert fyri at nevna nakrar.

**Bert hálvir sannleikar**

Røddir hava verið frammi um, at andstøðan á tingi eisini átti at havt fingið pening at gjørt sínar kanningar. Var hetta gjørt, hevði javnvág verið í tí grundarlagi, føroyingurin einaferð seinni, kanska í heyst við eini fólkaatkvøðu skal taka støðu út frá. Men sum nú er, eru tað bert hálvir sannleikar, sum fyriliggja og tí hevur føroyingurin krav uppá at vita, hvat aðrir møguleikar í ríkisrættarligu viðurskiftunum innibera.

**Reelt og ikki formelt sjálvstýri**

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava í uttanlandsnevndini gjørt eitt felags tilmæli til landsstýrið, har greitt verður víst á vansan við fullveldisætlanini. Tilmæli er sera skilagott og vísir á, at í staðin fyri formelt sjálvstýri eiga vit at hava reelt sjálvstýri í teimum málum, sum vit hava og ætla at yvirtaka. Og vit eiga at menna samfelagið til ein sjálvberandi búskap. Hetta fer at tryggja føroyingum livikor, sum er á sama støði, sum í grannalondum okkara.

**Fyrimunir við ríkisfelagsskapi**

Uppgávan hjá Sambandsflokkinum hetta og fram til eina komandi fólkaatkvøðu má tí vera, at lýsa fyrimunirnar, sum ríkisfelagsskapurin gevur okkum. Her er ikki bert talan um teir búskaparligu fyrimunirnar, men so ómetaliga nógv annað: útbúgving, heilsuverk, mentan o.s.fr. Hetta er ein sera stór uppgáva, sum eigur at takast í størsta álvara.

**Jóhan Petersen**



# HYGG & HOYR

Fríggjadagur 24. mars

# Rás 2 tvey økir um virksemið

*Fyrr í vikuni bórust boð um, at Rás 2 um góðan mánað fer at senda úr Klaksvík. Studio Pegasus skal nýtast sum útvarpsstøð, og verða sendingarnar í løtuni fyrireikaðar*

JÁKUP MØRK

Um góðan mána fáa Klaksvíkingar so at siga møguleika at lurta eftir síni egnu útvarpsstøð.

Talan er tó ikki um enn eina útvarpsrás, men harafturímóti um ein part av innihaldinum hjá Rás 2.

Tað er nevnliga soleiðis, at Studio Pegasus og Rás tvey hava gjørt eina samstarvsavtalu, sum inniber, at fimm senditímar um vikuna verða varpaðir út har norðuri.



### Skráin ikki løgd enn

Í løtuni arbeiða klaksvíkingarnir við at fyrireika innihaldið av teimum fimm vikuligu senditímunum, so enn er ikki endaliga fastlagt, júst hvørjar sendingar talan verður um.

Sum skilst verður talan tó um onkrar léttar mentunarsendingar, umframt at talan ætlandi eisini skal verða um ítrótta- og barnasendingar.

Hvørjar verður talan verður um, er heldur ikki fastlagt enn, men allarhelst verður møguleika at hoyra nakrar nýggjar røddir, tá farið verður at senda.

Talan verður sjálvandi um lokalt tilfar, men ætlanin er eisini, at sendingarnar verða hættaðar soleiðis, at allir føroyingar skulu tíma at lurta eftir sendingunum, klaksvíkingar ella ikki.

### Fíggjast við lýsingum

Studio Pegasus hevur annars virkað sum upptøkustudio, men nú farast skal undir útvarpsarbeiði, er neyðugt við nøkrum íløgum, og fara umbyggingar av ymsum slag fram í løtuni.

Til at fíggja sendingar og íløgurnar er ætlanin, at Studio Pegasus skal fáa meginpartin av teimum lýsingarinntøkum, sum væntandi koma til hesar sendingar.

# ÚTsjón - um loftmiðlar okkara



Annika Joensen, setursskrivari skrivar

## Hvem skal nu betale – hvem har råd til mer'…

Samráðingarnar í Keypmannahavn fríggjadagin fingu sjálvandi mestu umrøðuna í tíðindunum hesa vikuna. Tað vil siga í ÚF, sum hevur sent bæði tíðliga og seint við viðmerkingum og samrøðum úr Keypmannahavn og úr Føroyum.

Í SVF hevur verið heldur minni at frætt frá hesum álvarsmáli. Tey løgdu annars væl út mikukvøldið í farnu viku við Krosskast næstan í valfundarstíli. Síðani tá hava verið nøkur innsløg i Degi og Viku um samráðingarnar, og so Krosskast aftur í hesi vikuni. Ongin sending burturav um evnið, sum annars hevði verið upplagt. Tilfar er ríkiligt, sum tað sást mikukvøldið, tá sendingin varð ein hálvan tíma longur enn ætlað.

ÚF hevur tann fyrimunin, at tíðindasendingar eru á skránni fleiri ferðir um dagin, so har er saktans pláss at greiða frá gongdini í Statsministeriinum og í Tinganesi. Tey hava eisini havt nógv gott fólk í arbeiði, tí umframt »føstu« journalistarnar í Keypmannahavn, hava fleiri fólk úr ÚF eisini verið niðri og fylgt samráðingunum.

Per Højgaard og Kári Durhuus hava eftir mínari áskoðan vunnið sær eitt avgerandi pláss í føroyska tíðindaheiminum við sínum uppsøkjandi og nasku innsløgum. Gott at fleiri nú fáa ágóðan av hesum gjøgnum Føroysku Tíðindastovuna, sum hevur støð á Christiansborg.

Spurningarnir hava verið nógvir, og ikki óvæntað hava verið næstan líka nógv ymisk uppskot til svar. Eitt er givið, og tað er, at vit koma at hoyra nógv afturat um samráðingar og tøl næstu mánaðirnar. Vónandi fáa vit einaferð í summar eitt meira eintýðugt svar uppá, hvør skal gjalda hvat, hví og hvussu leingi. Fyrr enn tað er greitt, eru tað nógv fólk, sum ikki vita, um tey eru fyri ella ímóti fullveldi.

### Beinleiðis ítrottur í SVF

Leygardagin var nakað so sjáldsamt sum føroyskur flogbóltur beinleiðis í SVF: Steypafinalurnar í flogbólti vóru sera undirhaldandi at síggja í sjónvarpinum, og so var tað heldur ikki minni stuttligt, at Mjølnir vann báðar dystirnar! Hvørja ferð eg síggi ein hondbóltsdyst ella flogbóltsdyst undrist eg á, at fólk velja fótbólt framum annað sum sjónvarpsundirhald. Ferðin og spenningurin er so nógv størri í hinum báðum ítrottargreinunum. Vónandi fara vit at síggja meira føroyskan ítrott í SVF, tí hetta er tilfar, sum hevur stóran áhuga millum fólk.

### Arbeiddi brúdleypsdagin

Okkurt annað enn politikk havi eg heft meg við í vikuni. Sendingin um Klaksvíkar Sjúkrahús í 100 ár var sera stuttlig at síggja. Framsýningin av broytingini í sjúkrahúsverkinum var áhugaverd, men hon var enn betur veruleikanum, enn á skíggjanum.

Besti parturin av sendingini var, tá gomlu sjúkrasystrarnar sera livandi greiddu frá, hvussu tað var at arbeiða á sjúkrahúsi fyrr — hetta fekk helst onnur enn meg at vera takksom fyri, at sjúkrahúsverkið og samfelagið sum heild er so nógv broytt seinastu 50 árini. Um vit gloyma tað medisinska, hvør kann so t.d. ímynda sær í dag, at fólk høvdu aftrað seg við at biðið sær frí brúdleypsdagin, ella at ein arbeiðsgevari hevði noktað fólki at fingið frí ein slíkan dag.

Tað brotið, sum eg serliga hefti meg við, var um Klaksvíksstríðið. Tað er gott, at nakrir av teimum tankum, fólk gjørdu sær tá, verða skrásettir, serliga innan heilsuverkið, har nógv fólk upplivdu málið frá fyrstu hond. Málið er enn sera eymt, og tað, sum vit yngru vita, er helst meira »gongusøgur« enn nakað annað. Eg vildi fegin frætt nógv meira um hendan partin av søgu okkara. Tað er upplagt hjá SVF at fylgt upp her, tí tað eru nógv fólk, sum duga væl at greiða frá, uttan at koma at traðka á ov nógv líktorn.

### Nýggjar tíðir

Eg kann ikki halda mær, men má nevna Okkara Kokkar aftur. Matsendingin er mær ein fragd at hyggja at – miljøskadd vil onkur kanska siga. Deiligt at síggja góðan mat, gjørdan av fakfólki við góðari útgerð. Mánakvøldið var tilfarið m.a. soppar og tari. Vanar broytast, eisini í Føroyum. Hvat høvdu fólk sagt fyri 10 árum síðani, um kokkarnir høvdu staðið og drukkið whisky on the rocks í matsendingunum tá? Eg spyrji bara.

ÚTsjón

Marna Jakobsen, Steintór Rasmussen, Annika Joensen og Eyðun Joensen skiftast um at skriva ÚTSJÓN